# Maðurin úr Inishmaan – ein deiligur leikur

UMMÆLI EFTIR JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD



Regnið sílar niður niðri í miðbynum og útsynningurin rekur grá og ljósari skýggj kvikliga eftir himinum. Úr einum hátalara á Gamla Majarínum mjarra írskar balladur heimligar út um geilar og tey sum ikki ákkurát eru á veg at síggja næstu sýningina av fyrsta sjónleikinum hjá Grímu í hesum leikárinum, halda seg klókliga innandura.

Tað er seinnapartur sunnudag og býurin er ikki rættuliga vaknaður, eftir rokið leygarkvøldið.Ikki sørt av spenningi var at hóma í ganginum á Gamla Majarínum, sum næstan er størri enn sýningarhøli, ein hugnaligur bygningur. Tú hevur ilt við at ímynda tær, at her einaferð larmaðu tómar mjólkabyttur og at illir hestmenn og nólsoyingar ringdu her, tí mjólkin av vansketni hevði staðið nakað heitt umborð á mjólkabátinum. Í dag eru vit á veg til sjónleik, og vit vita slett ikki hvar bíðar fyri framman.

Í Hamburger Statsopern er so vítt til veggja, at fólk sita við kikara og hyggja fram á pallin. Á gamla Majarínum situr tú næstan inni á pallinum og tú kennir teg so nær leikarunum og søguni.

Sessast verða vit við eitt drigin aftur í tíðina til eina fjarskotna oyggj vestantil í Írlandi og eitt ella annað ger, at lopið allíkavæl ikki verðurt so langt. Tí pallurin, búnarnir, leikararnir, orðini og ljóðini kundu eins væl verið tikin úr eini bygd í Føroyum fyri 30 árum síðan ella í dag. Eg fekk næstan barnaárini upp í næsarnar og so tætt, at eg kendi andadráttin á teimum leikandi.

Søgan sjálv er einføld og snýr seg um ein ungan mann, sum er krypil. Hamurin, hann er í, ber frá øðrum vanligum fólkum og tí verður hann happaður og bara tí. Hann er kanska tann í leikinum, sum hevur mest millum oyrini og sum hann sjálvur tekur til um síni næstu. „Tit eru eisini kryplar inni í tykkum sjálvum, sjálvt um tað ikki sæst.“ Hans Tórgarð spælir leiklutin sum krypilin og hetta gjørdi hann so væl, at nú tveir dagar eftir hoyri eg rødd hansara framvegis fyri mær. Knøpp og eggjandi og full av vísdómi.

Søgan snýr seg um Krypilin og bygdafólkið og so um ein filmsleikstjóra, sum kemur úr Hollywood at gera ein film á grannaoynni. Hetta loypir heilt ólag í fjarskotna oyggjasamfelagið. Løttvunnin pund eru at hóma og dreymurin um ríkidømi í Amerika fær fólk at leita filmsstjóran upp. Krypilin sleppur til Amerika og so avdúka vit ikki meira.

Men leikurin er annað enn sjálv søgan, hann er ein so deilig avdúking av hvussu vit fara við hvørjum øðrum og hvussu vit hugsa í smásamfeløgum og í býarpørtum í størri samfeløgum. Tú skal ikki halda, at tú er nakað. Hevur tú teg fram at, so fær tú ein frammaná. Egi Dam spælir slatrivættið, sum rekst hús av húsi við teim seinastu nýggjheitunum og fyri hesar fær hann okkurt at leska seg við, tað verið seg mat og drekka. Slík eiga vit eisini í okkara samfelag í dag og tey ganga eisini kring Føroyar og siga frá søgum, meðan tey fáa okkurt heitt niður um. Og vóru ongi, sum tímdu at lurta eftir, so vóru heldur ongi slatrivætti, tí eru tey neyðug í einum samfelag. Eg hevði samkenslu við slætrivættinum og kendi til hansara trupulleikar sum tíðindamaður á egnum skinni.

Birita og Ria Tórgarð spæla gomlu genturnar, sum hava tikið sær av Kryplinum, tá foreldrini druknaðu. Tær eru deiligar, kjerligar við flatari hond beint á kjálkan, tá okkurt gongur í móti. Og deiliga svakar, serliga Ria, sum tosar við ein stein, sum um einki var hent. At so tvær av okkara fremstu sjónleikarkvinnun eiga hesar leiklutir, ger ikki gomlu genturnar hjá høvundanum verri.

Eg kann ikki nevna øll, men Kristina var uppaftur deiligari nú enn tá hon sjarmeraði øll í Glataðu Spælimonnunum. Tað er ein øgilig útstráling Kristina hevur sum sjónleikari.

Eg eri so væl nøgdur við hendan sunnudag seinnapart á Gamla Majarínum, at eg fái meg ikki til at skriva nakað negativt. Tað einasta, sum eg ikki rættuliga hóskaði inn í leikin, var vulgeri framferðarhátturin hjá 90 gomlu móðir slatrivættsins. Sjálvur eg eg so inniliga troyttur av hesum ommusangunum, sum so javnan eru at hoyra í útvarpinum, og hendan omman var einki mætari enn tann við Gjógv. Adelborg Linklett dugir væl á palli, so her má tað vera leikstjórin, sum hevur ein fingur við í spælinum og ábyrgdina.

Men Eyðun Johannesen hevur gjørt eitt frálíkt arbeiði allíkavæl, tí hann fekk meg allatíðina at samanbera Krypilin við Elefantmannin í gitna filminum. Krypilin var einki aftanfyri og tað er ikki vánaligt avrik, at ganda ein slíkan figur, sum át Oscars fyri mongum árum síðan, fram á pall á Gamla Majarínum.

Krypilin úr Inishmaan eigur at verða sæddur.






Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Tað er strevið at vera pinkutjóð

*Í Fótbóltssambandinum kendu teir seg fríggjadagi noyddar at brúka svenska UEFA formannin, áðrenn tað var komið upp á pláss, at ferðin til Jugoslavia verður í august*



*Leikarar okkara hava ofta ásannað, hvussu strevið tað er at vera pinkutjóð, men tað er tað so sanniliga eisini hjá Fótbóltssambandinum*

Tað verður ofta tikið til, at tað er strevið at teljast ímillum teir smáu – eisini í altjóða fótbóltsfamiljuni. Hetta hevur ferð eftir ferð verið sjón fyri søgn, og aftur í síðstu viku var tað rosøk hjá FSF at halda, at tað ofta er lættari at fáa viðurskiftini upp á pláss hjá teimum stóru, enn tað er hjá teimum smáu.

Seinnapartin fríggjadagin – eftir at pappírsútgávan av Sosialinum var farin til prentingar – frættu vit og løgdu út á Internet útgávuna, at avgerð varð tikin um, at útsetti dysturin ímóti Jugoslavia skal spælast í Beograd 15. august komandi ár. At avgerðin varð tikin fríggjadagin kom ikki av sær sjálvum. FSF noyddist at leggja nógva orku og tíð í, áðrenn hetta var komið upp á pláss.

### Leyst og liðugt hjá russarunum

Uppgávan hjá FIFA í hesum sambandinum var at gera av, nær dysturin, sum Russland skuldi havt spælt í Jugoslavia leygardagin, og dysturin, sum Føroyar skuldu havt spælt í Jugoslavia í morgin, skulu spælast.

FSF setti seg mánadagin í samband við FIFA. Tá fekst at vita, at tað vóru tríggir møguligir dystardagar. Ein var 15. november í ár, ein var 15. februar komandi ár, og ein var 25. apríl komandi ár.

– Vit søgdu teimum í FIFA, at hjá okkum var 25. apríl tann besti dystardagurin, og at tað fór at koma illa við, um dysturin skuldi spælast í november ella í februar. Tað tóktist liggja í luftini, at tað fór at bera til at spæla flaggdagin, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, sum í síðstu viku brúkti nógva tíð upp á henda spurningin.

Tað var ikki fyrrenn Ivan Eginsson – hann býr nú í Føroyum, men hevur fyrr arbeitt sum altjóða fótbóltstíðindamaður á størsta dagliga ítróttarblaðnum í Russlandi – segði Sosialinum og FSF, at ein annar møguleiki var 15. august, at hesin dagurin yvirhøvur kom upp á tal.

– Tá eg tosaði við FIFA týsdagin, skilti eg, at nú hevði Koloskov, sum er formaður í russiska fótbóltssambandinum og fyrrverandi næstformaður í FIFA, verið uppi í leikinum. Hann hevði greitt frá, at tað fór ikki at bera til hjá russarum at spæla nakran annan dag enn 15. august. So var tað avgjørt, og so var takið hjá okkum at finna ein annan dystardag, sigur Ísak Mikladal.

### Lennart noyddist at hjálpa til

Í FSF vildu teir ógvuliga fegnir hava avgreitt undan dystinum í Sveis leygardagin, nær dysturin í Jugoslavia skuldi spælast. Teir vildu ikki koma í ta støðu, at spælararnir sunnudagin fóru í hvør sítt herðashorn, meðan teir hildu seg vera farnar í vetrarfrí, og at FSF kanska í hesi vikuni skuldi senda boð eftir teimum aftur, tí teir skuldu fyrireika seg til landsdyst í Jugoslavia 15. november.

– Vit boðaðu FIFA frá, at vit ynsktu, at dysturin varð spældur í august, og í síðstu viku royndu vit fleiri ferðir at streingja á teir, men taø tóktist ganga striltið, sigur Ísak Mikladal.

Á middegi fríggjadagin var eingin avgerð tikin, og so metti Ísak Mikladal at tað var neyðugt at brúka sambandið, ið ivaleyst hevði størri møguleikar at trýsta eina avgerð ígjøgnum enn FSF.

Formannin í europeisku fótbóltssamgonguni, svian Lennart Johansson, hevur FSF havt gott samband við øll árini, Føroyar hava verið við í altjóða fótbólti. Torleif Sigurðsson telist millum teir av núverandi fótbóltsformonnunum í Europa, sum hava sitið longst, og hann hevur havt nógv samskifti við UEFA formannin.

– Lennart er formaður í nevndini hjá FIFA, sum hevur við HM kappingina í Japan og Suðurkorea at gera. Seinnapartin fríggjadagin ringdi eg til hansara. Hann var akkurát komin til Gøteborg, har hann leygardagin skuldi síggja dystin ímillum Svøríki og Turkaland. Eg greiddi honum frá, hvussu landið hjá okkum lá. Tað tóktist hjálpa, tí klokkan 16.30 henda sama dagin var tað komið upp á pláss, at dysturin í Jugoslavia verður spældur 15. august komandi ár, og tað líkar okkum sera væl, sigur Ísak Mikladal, aðalskrivari í Fótbóltssambandinum.

JH

# Eitt dømi

*Eins og Føroyar gjørdu móti Sveis, hevur Ongland roynt at spælt við trimum liðformonnum*

JÁKUP MØRK

Hetta hendi, tá teir 6. juni spældi annan dystin í bólkaspælinum í HM 1986, sum fór fram í Meksiko

Í dystinum, sum var móti Marocco, varð liðformaðurin, Bryan Robson, noyddir at fara skaddur av vøllinum, tá 41 minuttir vóru leiktir.

Hann lat tá armbindið til Ray Wilkins, men tá hesin minuttin eftir fekk reyða kortið, mátti hann lata bindið víðari til Peter Shilton, sum sostatt gjørdist triðji liðskiparin innan 3 minuttir, og tað hava sjálvt føroyingar ikki megnað.

